**Føðingar**

17. januar fingu Daimi Kjærbo og Mortan úr Hørg, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3650 gr.

19. januar fingu Elin og Elmar F. Petersen, Skálafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.

23. januar fingu Lina og Mikkjal Petur Næs, Tórshavn, eina dóttur, ið eitur Marta. Hon var 45 cm. long og vigaði 1650 gr.

24. januar fingu Guðrið T. og Jóannes Patursson, Kirkjubøur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4075 gr.

24. januar fingu Elinborg og Kári Reynheim, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 4000 gr.

25. januar fingu Birna og Bogi Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4350 gr.

26. januar fingu Anita Johansen og Olivar Danielsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

26. januar fingu Barbara Thomsen, Sandvík og Fróði Mortensen, Øravík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4530 gr.

27. januar fingu Mariann og Jan Poulsen og stórasysturin Gunnrið, Tórshavn ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

27. januar fingu Kára Joensen og Idar Lydersen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

28. januar fingu Shamila og Høgni Johannesen(Onglandi) eina dóttur.

28. januar fingu Elisa P. Vang og Høgni Joensen, Hvalvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3875 gr.

28. januar fingu Sólvá og Jørgen Nielsen, Norðragøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3750 gr.

28. januar fingu Diana og Jann Hansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

28. januar fingu Anja og Remi Thorleifsson, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2440 gr.

29. januar fekk Linda Maria Reynagarð, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3540 gr.

29. januar fingu Anita Berg og Rúni Samuelsen, Saltnes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4050 gr.

31. januar fingu Ingun Johansen og Bogi Gregersen, Strendur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3325 gr.



22. desember fingu Kristbjørg og Søren Sørensen, Sejlflod hesar fittu tvíburðarnar - gentu og drong. Gentan vigaði 2700 gr og var 46 cm. long, drongurin vigaði 2860 gr. og var 47 cm. langur. Tey eita Frederik og Sofie. Her situr ein stoltur stóribeiggi undir teimum, hann eitur Christian.



12. januar fingu Petur Sigurð og Sonni eina lítlasystur sum eitur Katrin Elisabet, hon var 55 cm long og vigaði 4400 gram. Foreldrini eru Rigmor og Jens Mortan Rasmussen, Skála

**Emma Winther 90 ár**

Í sambandi við føðingardagin verður móttøka í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 4. feb. 2008 kl. 18.00 – 21.00.

**Brúdleyp**

Leygardagin 2. februar kl.13.00 giftast í Prestagarðinum í Miðvági, Rigmor í Lon, Miðvágur og Hans Petur Tjørnudal, Signabøur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Vágum. Vælkomst til kaffi verður í Filadelfia Vágar í Miðvági kl. 20.00 Øll eru hjartaliga vælkomin:):)

2. februar giftast í Thyregod kirkju Ann Christin Johannesen, Tvøroyri og Ingálvur Nordendal, Toftir. Adr. Ågårdsvej 61, 7323 Thyregod DK.

**Silvurbrúdleyp**

Mánadagin 28/1 høvdu hjúnini Lea og Óli Wolles í Søldarfirði silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 9/2. Tey, ið ynskja at gleða okkum við eini vitjan eru væl komin í høllina á Eiði leygardagin 9. februar millum kl. 15. og 21. Fyri at hava eina hóming av, hvussu mong eru væntandi, hevði verið gott at fingið boð í seinasta mikudagin 6. februar á tlf. 44 20 31 ella teldupost oliwo@kallnet.fo

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 2. feb. kunnu Torborg og Debus Hansen, Toftir halda gullbrúdleypsdag. Dagurin verður hildin saman við børnunum og ommu- og abbabørnunum.

# Gullbrúdleyp á Toftum



Leygardagin 2. februar hava Torborg og Debus Hansen á Toftum verið gift í hálvt hundrað ár. Tey eru millum ímyndirnar av toftafólki og Toftum, og tey munnu vera mong, sum komast við tey í sambandi við Svangaskarð og B68.

Torborg er fødd 10. desember 1934. Foreldrini vóru Helena fødd Johannesen og ættað úr Hvalvík, og Jens Christian Olsen uppi á Regni á Toftum, sum var løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin. Tey fingu fimm børn: Jacob (1928), Jógvan Ingvard (1930), Nickolaj (1932), Torborg (1934) og Helenu (1936). Helena býr í Havnini, og øll hini búgva á Toftum.

Helena doyði á barsilssong við Helenu. Jens Christian giftist uppaftur við Hildu fødd Hansen av Toftum. Hilda og Jens Christian fingu sjey børn: Ruth (1940) á Argjum, Diana (1943-1944), Diana (1944) á Toftum, Alfred (1947) í Saltnesi, Jonny (1949) á Argjum, Johannes (1951) í Saltnesi og Annika (1956) á Toftum. Jens Christian doyði í 1963, og Hilda, sum var fødd í 1917, doyði í fjør.

Debus, sum er føddur 23. juni 1932, er ættaður av Stykkinum á Nesi. Foreldrini vóru Dagmar fødd Hansen og ættað úr Pálsstovu í Norðragøtu og Petur Hans Hansen úr Gerðinum á Nesi. Tey fingu tíggju børn: Johannes (1924-1996) á Nesi, Petur (1925-2007) á Nesi, Manuel (1926-2001) búði niðri. Maria (1928) í Gøtu, Símun (1930) á Nesi, Debus (1931), Hildibjørg (1932) á Toftum, Herdis (1935) í Gøtu, Kjartan (1937) býr niðri, og Piddi (1939) á Toftum. Dagmar doyði í 1976, og Petur Hans doyði í 1997.

Torborg tænti í Havn hjá Ester Djurhuus, og hon var í handli í Oyrum, áðrenn hon fór niður til Haslev á húsarhaldsskúla. Hon visti ikki um nakra aðra føroyska, tá ið hon fór avstað. Tá ið hon kom niður, vóru tær 25 føroyskar ella umleið helmingurin av holdinum. Tað hevur verið gott samanhald millum hesar síðani, og tær hittast av og á.

Debus hevur verið sjómaður alla sína tíð, og í mong ár var hann kokkur. Hann hevur ikki gingið í kokkaskúla, men tað hevur ligið væl fyri at matgera tað, sum hann hevur lært frá konuni, og góðsliga framferðin og ljósa lyndið hava verið kærkomnir eginleikar.

Debus hevur siglt við nógvum skipum, og flestu teirra hava verið úr heimbygdini. Hann hevur verið við eitt nú Elsu, Jógvan Norðri, Stapanum, Polaris, Snodda og síðsta skipið, sum hann var við, var Mascot, sum hann sigldi við í eini tjúgu ár.

Um ta tíðina, tá ið tey bæði giftust, sigldi Debus í fleiri ár við íslendskum trolara.

Torborg var í nógv ár heima hjá børnunum, sum eru sjey í tali. Tá ið tann yngsti varð føddur, var tann elsti ellivu ára gamalur: Asbjørn (1959), Jens Christian (1961), Petur Hans (1963), Høgni (1964), Doris (1967), Heri (1968) og Øssur (1971). Doris býr í Søldarfirði, Jens Christian býr á Nesi, og allir hinir dreingirnir búgva á Toftum.

Eitt skifti arbeiddi Torborg á Nyki, og so var hon í fleiri ár heimahjálp. Tað var bygdarmynd at síggja hana ganga millum heimini, og tað kom fyri, at teinurin var úr Rókini og heilt út á Nes.

Dreingirnir vóru óførir fótbóltsspælarar, og onkra ferðina vóru fimm teirra á besta B68 liðnum í senn! Teir vóru eisini góðir í talvi. Foreldrini vístu áhuga og stuðlaðu, og tí var tað so sjálvsagt, at heimið hjá sera fryntligu og fyrikomandi gullbrúðarparinum gjørdist miðdepul í bygdini, har nógv vitjaðu inn á gólvið.

B68 bygdi hús og vallir, og Torborg og Debus taldust millum teirra, sum stuðlaðu undangongumonnunum av fullum huga. Virksemið var stórt í B68 húsinum, og Torborg hevði inntil fyri fáum árum síðani høvuðsábyrgdina av matgerðini. Debus stuðlaði henni væl, og kring landið og eisini uttanlands, eru tað mong, sum hava lært gullbrúðarparið at kenna á Svangaskarði.

Síðani Debus legðist uppi, hevur hann røktað á Mýrunum, egnt og viðhvørt hjálpt til at landa, tá ið tað hevur staðið á at fáa fólk. Barnabørnini eru 21 í tali – 12 dreingir og 9 gentur – fylla nógv hjá gullbrúðarparinum, sum framvegis eru frísk og ferug.

Stóra dagin halda Torborg og Debus saman við sínum næstu.

J

# Ferðaleiðarar í Miðlahúsinum

**Mánakvøldið 4. februar klokkan 20 skipa føroyska ferðaskrivstovan »Tora Tourist Traffic« og ferðaleiðaraskúlin »Service & Co« í Barcelona fyri ferðaleiðarakvøldi í Miðlahúsinum**



Tað verður Súsanna Gunnarsson frá ferðaleiðaraskúlanum »Service & Co« sum kemur at greiða frá um skúlan. Hon var í Føroyum í mai í fjør í somu ørindum. Skúlin hevur síðan upplivað at hava nógv fleiri føroyskar næmingar, og tí hevur Súsanna valt at koma aftur hendan vegin at greiða fleiri føroyingum frá um skúlan.

Á skránni verður m.a. frágreiðing um ferðaleiðaraútbúgvingina í Spania og um tað at vera føroyskur næmingur á skúlanum. Eisini greiða fleiri fyrrverandi næmingar frá um skúlan. Aftaná verður ymiskt á skránni, umframt at kaffi og smákøkur vera at fáa.

Ferðaleiðaraskúlin »Service og Co« upplærir ferðaleiðarnar til tey størstu og mest væl umtóktu ferðaliðini í øllum Skandanavia. Súsanna sigur, at sum føroyingur hevur tú sterk kort á hondum, tí føroyingar eru væl umtóktir, tá tey stóru ferðaliðini seta starvsfólk til at átaka sær umráðandi tænastuuppgávurnar úti á ferðastøðunum. Føroyingar eru m.a. væl umtóktir, tí teir duga væl tey skandinavisku málini, teir kunnu tosa við øll og skilja danskt, norskt og svenskt, og tað er ein fyrimunur hjá teimum stóru ferðaliðunum.

Service og Co. er tann einasti ferðaleiðaraskúlin sum »við garanti« kann bjóða arbeiði til allar teir góðkendu næmingarnar. Tað merkir, at um tú verður góðkendur, so kanst tú síggja fram til eitt spennandi arbeiði í útlandinum, sigur stjórin í »Service og Co« Chris Wager. Skúlin er stórur og vælkendur. Fleiri enn 4.000 næmingar hava tikið prógv á skúlanum, síðan hann varð stovnaður í 1998.

Súsanna Gunnarsson er 24 ár gomul og fødd í Havn. Síðan 1994 hevur hon búð á Bømlo í Vesturnorra. Líðug við framhaldsskúlan var hon eitt skifti í USA og eitt skifti í Føroyum. Súsanna hevur, eins og fleiri aðrir føroyingar, gingið á ferðaleiðaraskúlanum hjá Service & Co., og síðan var hon eina sesong ferðaleiðari fyri charterfelagið Apollo á Kreta.

Nú hevur Súsanna fingið starv á ferðaleiðaraskúlanum hjá Service & Co. í Barcelona. Í fjør var hon í Spania fyri betur at læra seg málið, og var í starvi sum lærari á skúlanum í Santa Susanna. Í maj var hon so í Føroyum og greiddi frá um skúlan. Síðani juli 2007 hevur Súsanna arbeitt á skrivstovuni hjá Service & Co. í Århus. Áhugaðir føroyingar kunnu tí ringja til skrivstovuna og fáa hjálp á føroyskum.

Tora Tourist Traffic í Tórshavn kann hjálpa, um tú hevur spurningar, sum kunnu sendast til Sámal Bláhamar á adressuni: tora@tora.fo. Upplýsingar kunnu eisini fáast á heimasíðuni: www.guide.fo.

Her kanst tú eisini lesa frásøgn frá fyrrverandi næmingurm - tað kann geva tær eina hóming av, hvat eitt uppihald á ferðaleiðaraskúlanum kann hava at siga fyri tína framtíð. Eisini ber til at senda spurningar til: info@service-co.dk, har svar fæst innan 48 tímar.